# Oddagrein

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo



# LATIÐ TUNNILIN BÍÐA

Tað vóru sera áhugaverd sjónarmið, sum Frank Hansen, civilverkfrøðingur, bar fram í Sosialinum um vikuskiftið. Hann mælir staðiliga frá at fara undir verkætlanina við Skálafjarðartunlinum, tí tað ber til at gera eina væl bíligari og orkuavmarkandi høvuðsfarleið millum Eysturoynna og Streymoynna – eins og Norðoyggjar og Vágar.

Og meira vit hugsa um tað, so er tað sera løgið, at meginparturin av løgtinginum fer upp á gartera, tá nakrir einstaklingar koma við einum góðum hugskoti um at gera tunnilin undir Tangafirði av Nesi til Havnar.

Sjálvandi hevur ein slík verkætlan nógv spennandi perspektiv í sær, men alfa og omega fyri infrastrukturin í Føroyum er ikki, hvussu skjótt tað skal vera at koma av Toftum til Havnar.

Og bara tað, at lokalir tingmenn hálova púra ókritiskt eini slíkari verkætlan og garantera, at hetta er tað besta, eigur at fáa tey, ið evsta vald hava, at umhugsa hetta av nýggjum. Húsagangurin hjá Eik Banka legði fyribils fót fyri verkætlanini, og hann verður helst eisini høvi til, at løgtingið nú kann endavenda øllum málinum.

Verkætlanin er kanska eitt úrslit av sínari tíð, tá bankastjórar og advokatar kundu lokka skipseigarar til handlar í hundraðtalsmillióna klassanum. Hví so ikki gera ein tunnil fyri eina milliard? Og tá so nevndarlimirnir fingu nakrar hundraðtúsnd krónur í partapeningi eisini, so áttu øll at verið glað... ella hildu vit, at trøini vuksu inn í himmalin?

Ting- og landsstýrisfólk við ábyrgd eiga nú at hugsa seg um av nýggjum. Øll eiga sjálvandi at lesa greinina hjá Frank Hansen, har hann eitt nú vísir á, at við at gera eina aðra høvuðsfarleið á meginøkinum, sum styttir farleiðina úr Havn til Gøtu, Fuglafjarðar, Leirvíkar og Norðoyggjar líka nógv sum Skálafjarðartunnilin - og at tað fer at taka 35 minuttir at koyra úr Havn til Klaksvíkar. At farleiðin fer at ganga ígjøgnum seks av teimum ætlaðu níggju kommununum. At íløgan kostar 675 mió kr. At orkunýtslan verður minni, tí




tað verða færri brekkur, at raksturin verður bíligari, og at øll ætlanin ikki nýtist gerast í senn.

Landið eigur sjálvandi ikki at lata privatum eina so stóra verkætlan soleiðis upp á gjøt. Bara tað at málið verður eitt stríðsmál millum norðoyingar og vágafólk móti hinum sigur, at málið er als ikki búgvið. Sjálvandi skulu vit øll vera felags um útreiðslurnar av samferðslunetinum, og ein slík verkætlan, sum Skálafjarðartunnilin, skal sjálvandi verða partur av eini skilagóðari landsætlan, so ein so stór íløga kemur at gagna øllum landinum.

**» At lokalir tingmenn hálova verkætlanini skapar mistanka**

## Skræpan hjá Jákupi Magnussen

– Tað er óhoyrt og óakseptabult, at vit skulu tvingast til at gjalda 3.700 krónur um árið fyri hasa skræpuna, sum Kringvarpið sendir.

Hesi »vísu« orð eru søgd av tingsins røðarapalli av harra Bill Justinussen, løgtingsmanni Miðfloksins. Hann heldur, at serliga sendingarnar hjá Jákup Magnussen eru tann reina skræpa, tí støðið er so lágt. Hansara sendingar eru niðurbrótandi og oyðileggjandi, heldur miðfloksting-maðurin.



Tá Rás2 spurdi hann týsdagin, um einki er gott, sum Kringvarpið sendir, so var tað tó tað.

– Tað er ikki BARA skræpa, sum Kringvarpið sendir, men serliga sendingar hjá Jákupi Magnussen, Fólksins Rødd og ungdómssendingarnar, segði hann.

Tingmaðurin heldur, at har er so nógv lættisoppatilfar, fólk brúka so ljótan munn, tikið verður ímóti øllum tíðarráki uttanífrá, sum er niðurbrótandi fyri føroyska mentan og alt tað góða, sum Kringvarpið annars hevur bygt upp.

Bill Justinussen ber saman fíggjarætlanina hjá Kringvarpinum upp á 60 milliónir og so ta lítlu upphæddina, sum Rás2 verður rikin fyri.

– Rás2 hevur bara ein tíggjundapart av tí, sum Kringvarpið hevur, men tann munurin sæst ikki aftur í tilfarinum, ið sent verður, heldur Bill Justinussen.

*Hetta eru hørð orð av einum tingmanni at nýta um navngivin starvsfólk í Kringvarpinum, at skíra alt hansara avrik fyri skræpu! »Skræpa« merkir sambært orðabókini »tunt skarn«, ella »leyst lív«. Tá heldur hann ikki lítið um seg sjálvan. Hetta má vera eitt mál, ið fakfelagið, Føroysk Miðlafólk, tekur upp.*

*Vit kunnu so bara staðfesta, at gott er, at øll ikki eru sum Bill – og fegnast um, at fólk eisini eru sum til dømis Jákup Magnussen, tí tá fáa vit eitt litfagrari samfelag.*



*Spennandi verður at hoyra »skræpupanelið« (altso sambært Bill) hjá Jákupi Magnussen fríggjadagin klokkan 17...*



**» Betur er bøtandi hond...**

JON HESTOY
KJAK Á SÍÐU 13



**» Innast inni er Høgni glaður...**

EDMUND JOENSEN
KJAK Á SÍÐU 33

## Ein milliard



Fíggjar og búskaparkreppan sum rakti heimin fyri nøkrum árum síðan, hevur havt sína ávirkan á hugin hjá føroyingum at keypa vørur úr útlondum.

Síðan metárið 2007 er innflutningurin, uttan skip, flogfør og brennievni, minkaður eina góða milliard krónur, sigur Hagstovan í síni nýggjastu uppgerð.

Í 2007 var hesin innflutningur 4,2 milliardir, men í 2010 var hann lækkaður niður í 3,1 milliard.

Hóast talan er um stóra minking, skal havast í huga, at tey tvey árini beint undan fíggjarkreppuni, altso í 2006 og í 2007, vaks hesin innflutningurin heili 40%, úr 3 milliardum upp í 4,2 milliardir.

Fyribils sær út til at innflutningsvirðið rakti botnin í 2009, tí í 2010 er innflutningurin av øðrum vørum enn skipum, flogførum og brennievni, vaksin 2 %.

Tað er eitt sindur ymiskt hvussu minkingin hevur rakt ymisku vørubólkarnar. Innflutningsvirðið av akførum er minkað niður í ein triðing av virðinum í 2007, men keypið av maskinum, amboðum og øðrum tilfari til byggivinnuna, er minkað niður í eina helvt.

Innflutningur av vørum til beinleiðis húsarhaldsnýtslu minkaði 14%. Hóast hetta ikki er eins nógv sum í fleiri av hinum bólkunum, so er tað fyrstu ferð síðan kreppuna fyrst í 90'árunum at hesin bólkurin er minkaður.

Einasti vørubólkur har innfluttningsvirðið er munandi økt, er rávøra til fiskavirking, har varð meir enn tvífalt so nógv innflutt í 2010 samanborið við 2007.

Sosialurin
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

Marknaðardeild
lysing@sosialurin.fo

Tórshavn Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

Norðoyggjar Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

Suðuroy tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

*Haldarar, sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*